## ÍF Føroyar blandar seg í oddin

Eftir seks teir fyrstu dystirnar í Keypmannahavnarseriuni hevur 1. lið hjá ÍF Føroyum lagt seg millum tey fremstu liðini.

Hóskvøldið leikti ÍF Føroyar ímóti KFUM, og føroysku útisetarnir vunnu 2-0 eftir hálvleiksstøðuna 1-0. Jørgin Meitilberg legði ÍF Føroyar framum fyri steðgin, og Ken Nónklett økti til 2-0 beint eftir steðgin.

Trettan lið eru í deildini, og ÍF Føroyar liggur í løtuni á fjórða plássi við tólv stigum. Bert trý stig eru upp til oddaliðið, ið hevur fimtan stig. ÍF Føroyar hevur eisini ein dyst til góðar samanborið við nøkur av hinum liðunum í oddinum.

Venjarar hjá ÍF Føroyum eru Julian Hansen, ið vandi HB seinnu hálvu í fjør, og Frankie Jensen.



## Henke sendi Celtic í pengalandið

Við uppleggum til bæði Barcelona-málini mikukvøldið gjørdist Henrik Larsson ein av avgerandi spælarunum í dystinum. Hetta var seinasti dystur hansara fyri Barcelona, og umframt upplivingina, sum finalan var, fekk hann samstundis givið gomlu liðfeløgunum úr Celtic eina kærkomna gávu. Hevði Arsenal vunnið finaluna, datt Celtic nevnliga niður um liðini, sum vinna sær beinleiðis rætt til Champions League. Tá vildi talan verið um undandystir, og sjálvandi vildi tað inniborið ein vanda fyri, at Celtic ikki fekk fatur á mongu UEFA-milliónunum, sum fylgja við hesum. Nú er tann vandin tó burturi hjá skotsku meistarunum, og ikki minst munnu tey takka Henke fyri hesum.

**-mørk**

# Nýggjur B36-miðvøllur skal royna seg

**Við langtíðarskaðum hjá tveimum av lyklaspælarunum, skal B36 seta nýggjan miðvøll saman, nú NSÍ skal ota seg enn nærri oddinum**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í B36 kenna tey seg í ólukkumát hava kent sviðan av, hvussu meint skaðar kunnu raka. Higartil hevur tað verið sjáldan, at Sigfríður Clementsen hevur kunnað sent sína “idealuppstilling” á vøllin, og enn ganga nakrir mánaðir, áðrenn tað aftur letur seg gera.

Ikki minst eru missirnir av Fróða Benjaminsen og Inga Højsted tungir at bera, og hartil eru Obi og Herbert í Lon framvegis ikki tøkir.

Á jaliga listanum telur, at Kenneth Jacobsen nú er afturkomin til Føroya, eins og Mikkjal Thomassen er tøkur eftir leikbann, og serliga hesin seinni nevndi man nú fáa ein eyka stóran týdning á nýggja miðvøllinum, sum nú skal spælast saman. Mest sannlíkt saman við John Hansen og Hanus Thorleifsson.

### NSÍ er væl fyri

Men ráð eru tó ikki til tey stóru eksperimentini, nú NSÍ kemur á vitjan. Eftir eina heldur keðiliga byrjan, hevur NSÍ veruliga tikið dik á seg, og kunnu teir eisini koma úr Havnini við einum ella kanska trimum stigum, er einki at ivast í, at teir eru sera væl nøgdir.

Í Runavík verður sagt, at allir mans eru til reiðar at tørna út, og so er spurningurin bara, hvussu Trygvi Mortensen velur at blanda sær kortini.

# Tunnligt í Klaksvík

**Hóast teir hava mist lyklaspælara, so halda teir í GÍ seg hava møguleika at verða teir fyrstu at koppa KÍ**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Klaksvíkingar vóru í góðum hýri, tá ið teir mikukvøldið í síðstu viku fóru av Eiði. Síðani hevur tað verið rættuliga friðarligt í fótbóltinum har norðuri. Eftir stóru úrtøkuna í átta teimum fyrstu umførunum fingu spælararnir frí frá venjing inntil mánakvøldið.

Fyrrapartin av hesi vikuni vóru fleiri burturi frá venjingini, men tað verður roknað við, at teir flestu fara at verða tøkir sunnudagin. Heilt víst er tað kortini, at Paul Clapson ikki verður við. Eftir reypa kortið á Mølini er hann leikbannaður, og í dag skuldi læknin skurðviðgera meniskskadda knæið.

Meinhardt Joensen spældi 2. hálvleik við skaða í afturpartinum. Og tann skaðin tykist vera heldur drúgvur at sleppa av við. Símun Joensen noyddist at gevast á hálvari leið á Eiði. Hann vandi fyrstu ferð aftur hóskvøldið. Umframt landsliðsspælararnar Hjalgrím Elttør og Atla Danielsen hava eisini aðrir verið burturi frá venjing.

Spurningurin er, hvussu Tony Paris fer at skrúva liðið saman í álopinum og eisini í verjuni. Steffan Kalsø ella Hjalgrím Elttør eru mest sannlíku boðini upp á fremsta álopsplássið. Atli Danielsen hevur verið aftasti útispælarin. Í 2. hálvleiki á Eiði var Sinisa Jovanovic aftastur. Spurningurin er hvønn av teimum báðum – Atla ella Sinisa – Tony Paris hesa ferð fer at líta aftastu ódnina til.

Gøtumenn siga seg vera bilsnar av sær sjálvum, at tað higartil hevur hilnast so væl, sum tað hevur gjørt. GÍ hevur bara tapt á Mølini, og nú fara gøtumenn at royna at fella ósigraða KÍ. Í GÍ halda teir seg at vera nóg væl fyri at fáa bilbukt við KÍ, og teir fáa tvær royndir at útinna hetta í Klaksvík, nú bæði lands- og steypakapping eru á skránni innan fimm dagar.

Hjá GÍ kom tað sera illa við, at Poul Ennigarð undir venjing fyrr í vikuni breyt fótin. Poul hevur verið rættuliga stinnur miðvallari í ár. Burtursæð frá honum eru allir hinir GÍ spælararnir tøkir. Eisini Niclas Niclasen - miðverjin úr Klaksvík - sum sunnudagin fyri fyrstu ferð í týdningarmiklari uppgerð fer at royna seg móti gomlu liðfeløgunum.

# Tað lýsnar í Eysturoy

**Hóast teir enn sakna stuðulsspælarar, so gongur tað rætta vegin á Skála, har teir sunnukvøldið fara at takast í botnstríði móti ÍF, sum endiliga tykist hava fingið bilbukt við skaðarnar**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er bygdarstevna á Skála í vikuskiftinum. Landskappingardysturin móti ÍF verður klokkan 18 sunnukvøldið, og tað er eingin ivi um, hvør besta stevnugávan hevði verið hjá skálamonnum. Hon hevði verið sigur og harvið full úrtøka.

Í ár hevur Skála orsakað av skaðum brúkt nógv fólk, og úrtøkan hevur ikki verið nakað serlig. Bara í heimadystinum móti VB/Sumba í triðja umfari 13. apríl hevur tað eydnast at fáa fulla úrtøku.

ÍF fekk fyrstu stigini, tá ið teir næstsíðsta mikukvøld vunnu stórsigur, 3-0, á heimavølli móti B68. Um tað eydnast ÍF at fáa øll stigini við sær inn um Varmakeldueið sunnukvøldið, so verður ÍF ikki longur á niðasta plássinum, sum teir hava hildið heitt átta tey fyrstu umførini.

Á Skála er manningarligastøðan ikki heilt góð enn, men tað gongur rætta vegin. Pætur Dam Jacobsen, sum bæði var skaddur og leikbannaður í Runavík, Poul N. Poulsen og Bjarni Jørgensen, sum fóru av vøllinum, tí teir vóru skaddir, eru komnir fyri seg aftur. Bjarni er so mikið væl fyri, at hann sunnudagin fyri fyrstu ferð umboðaði Føroyar.

Pauli G. Hansen var ikki heilt klárur mikukvøldið í síðstu viku. Í 1. hálvleiki var hann vongverji í høgru, og eftir steðgin var hann á vanliga miðvallarplássinum. Tað gekk hampuliga væl, og á Skála rokna teir við, at Pauli verður millum teir fyrstu ellivu sunnudagin.

Ein av orsøkunum til at tað hevur hilnast illa hjá ÍF higartil í ár kann vera, at tað hevur staðið syndarliga illa til við fólki. Nú stendur so mikið væl til, at allir teir, sum teir rokna við at hoyra til besta liðið, eru tøkir. Karstin Joensen segðist at vera givin. Málverjin var kortini við móti B68, og hann verður eisini í málinum á Skála.

# Nú er kravið at fáa stig

**Hjá EB/Streymi ræður nú um at venja seg við leiklutin sum oddalið. Ein leiklutur, sum eisini ger, at áskoðararnir seta krøv til stig**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Millum annað er tað nú nærum eitt krav, at talan er um trý stig sunnudagin. Eisini hóast talan er um útidyst í Vági, har flestu liðini aloftast hava tað trupult. Stigatalvan staðfestir tó munin, sum í løtuni er á liðunum, og tí gerast bæði viðhaldsfólk og spælarar kræsin. Eisini hóast EB/Streymur enn ikki hevur vunnið í Vági, tá tosað verður um fremstu deildina. Og tað skapar eitt trýst, sum spælararnir mugu læra at liva við.

Piotr Krakowski og hansara menn kunnu tó fegnast um, at hópurin er at kalla fullmannaður, nú farið verður til Vágs. Einasti spælarin, sum ikki er tøkur, er Ólavur Poulsen, sum hevur ein brotnan arm.

Eisini hjá heimaliðnum eru allir mans tøkir. Birgir Jørgensen var í burðafarloyvi, tá VB/Sumba vitjaði í Havn. Og einki er at ivast í, at hann er kærkomin aftur á liðið. Bæði sum skarprættari og spælstøð. Og ikki minst sum ein royndur stuðul hjá mongu ungu spælarunum á liðnum.

# Kósin vísir hvønn sín vegin

**Gestirnir á Svangaskarði hava ikki tapt fimm tær síðstu ferðirnar, og vertirnir hava einki stig fingið fýra tær síðstu ferðirnar**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eftir fýra tey fyrstu umførini var einki glopp á støðutalvuni millum tey bæði feløgini, sum sunnudagin fara at takast á Svangaskarði. Síðani tá hevur gingið skjótt hvønn sín vegin. Vertirnir í B68 hava einki stig fingið í fýra teimum síðstu umførunum, og toftamenn eru nú so mikið niðarlaga staddir, at tað er møguleiki fyri, at teir eftir 9. umfarið vera aftastir.

Hjá HB hevur kósin verið hinvegin. Eftir laka úrtøku fyrstu ferðirnar, hava havnarmenninir rættuliga fótað sær. Úrtøkan hevur verið góð, og nú skal lítið til afturat, áðrenn teir rættuliga fara at leggja seg út í kappingina millum tey fremstu.

Krzystof Popczynski fær gott skoðsmál frá sínum spælarum. Eftir at hava sparkað fótbólt í fleiri ár eru teir í HB aftur farnir at spæla, og tað hevur gingið skjótt við leikligu menningini.

Seinnapartin av síðstu viku vóru fimm av spælarunum burtur frá venjing, tí teir vóru við landsliðnum í Póllandi. Í hesi vikuni hava teir aftur vant við fullari ferð. Tað er kapping um summi av plássunum. Serliga á miðvøllinum og í álopinum, har venjarin hevur latið ungu og evnaríku menninar skiftast um at spæla.

Í B68 er tað kærkomið, at málverjin, Tórður Thomsen, er tøkur aftur. Hann var leikbannaður í Fuglafirði orsakað av útvísingini í Vági.